**Løgtingið**

10. januar 2018
Mál: 18/00042-1
Tygara skriv:
Viðgjørt: KG

**Løgtingsmál nr. xx/2017: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung** (Heimild hjá heilsufrøðingum at heilsukanna børn og ung, tá skúlatíðin byrjar og endar)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung**
(Heimild hjá heilsufrøðingum at heilsukanna børn og ung, tá skúlatíðin byrjar og endar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, sum broytt við løgtingslóg nr. 9 frá 12. mars 2014, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Børn undir undirvísingarskyldugan aldur skulu fáa tilboð um sjey fyribyrgjandi heilsukanningar hjá kommunulækna. Tríggjar av hesum kanningum skulu fara fram í fyrsta ári barnsins.”

**2.** Í § 2 verða stk. 2 og 3 strikað.

**3.** Aftan á § 2 verður sum kapittul 2 a sett:

“**Kapittul 2 a**
**Fyribyrgjandi heilsukanningar hjá heilsufrøðingi ella kommunulækna**

**§ 2 a.** Børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri skulu fáa tilboð um tvær heilsukanningar hjá antin heilsufrøðingi ella kommunulækna. Tann fyrra kanningin skal verða bjóðað við byrjan av skúlatíð barnsins. Tann seinna kanningin skal verða bjóðað tí unga stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar.”

**4.** § 4 verður orðað soleiðis:
“**§ 4.** Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um heilsukanningar sambært § 2 og § 2 a.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2018.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøk til lógaruppskotið

Sambært lógini um fyribyrgjandi heilsustænstur til børn og ung, hava øll børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri rætt til tilboð um tvær heilsukanningar hjá kommunulækna. Hóast tilboðið hevur verið í gildi síðani 1. januar 2006 (Ll. nr. 63 frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung, sum broytt við løgtingslóg nr. 9 frá 12. mars 2014), eru tað framvegis sera fá børn, sum hava tikið av tilboðnum. Henda støða er ikki nøktandi. Tískil verður við hesum lógaruppskotinum skotið upp at fremja eina broyting í galdandi lóg, sum eftir ætlan fer at hava við sær, at fleiri børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri fara at taka av tilboðnum um fyribyrgjandi heilsukanningar við ávikavist byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar.

Endamálið við lógini er at betra fyribyrgjandi heilsutænasturnar til øll børn og ung í Føroyum. Sambært lógini skulu børn og ung hava tilboð um fyribyrgjandi heilsukanningar hjá lækna og heilsufrøðingi frá føðing til undirvísingarskyldugan endar. Tað er uppgávan hjá landinum at leggja til rættis og veita tænasturnar, og landið hevur evstu ábyrgd av, at børn og ung fáa tilboðini um tær heilsuveitingar, sum lógin fevnir um.

Orsøkin til, at lógin varð sett í gildi í 2006 var, at á flestu skúlum hevði eingin skúlalækni verið í starvi í longri tíð. Av somu orsøk høvdu nógvir skúlanæmingar ikki fingið tilboð um fyribyrgjandi heilsukanningar hjá skúlalækna. Sum ein avleiðing av hesum, var tað fyribyrgjandi heilsuarbeiðið ikki eins um alt landið.

Heldur enn at halda fram við skipanini við skúlalæknum, varð gjørt av at broyta skipanina, soleiðis at kommunulæknar skuldu gera tær kanningar, sum skúlalæknar áttu at gjørt. Av tí, at øll børn eru knýtt at kommunulækna, kundu øll børn á henda hátt fáa eitt veruligt tilboð um heilsukanningar og ikki bert hava eitt formelt tilboð um slíkar.

Síðani skipanin varð sett í gildi 1. januar 2006, hevur tann parturin, sum snýr seg um tilboð um heilsukanningar hjá heilsufrøðingum og heilsukanningar hjá børnum undir undirvísingarskyldugan aldur hjá kommunulækna, stórt sæð virkað væl.

Hinvegin hevur parturin, sum snýr seg um at heilsukanna skúlanæmingar hjá kommunulækna, ikki virkað eftir ætlan. Ein av orsøkunum til, at skipanin ikki virkaði eftir ætlan, var ásetingin í § 3 um, at heilsukanningarnar í sambandi við skúlabyrjan og skúlalok skuldu fara fram hjá einum kommunulækna, ið hevði tikið eitt skeið í skúlamedisini.

Í eini roynd at fáa fleiri børn og ung at taka av tilboðnum um heilsukanningar hjá kommunulæknum, varð lógin broytt í mars 2014. Broytingin hevði við sær, at ásetingin um at bert kommunulæknar, sum høvdu eitt skeið í skúlamedisini, kundu heilsukanna børnini og tey ungu, varð strikað. Tørvur var ikki á eini slíkari áseting, tí kommunulæknar, sum partur av síni útbúgving, longu hava neyðuga førleika at heilsukanna børn og ung.

Heilsutrygd átók sær at kunna børnini og tey ungu um tilboðið um heilsukanningar hjá kommunulækna. Avgjørt varð, at skúlaárið 2015/2016 var ein royndarskipan, sum skuldi eftirmetast. Sum tað sæst í yvirlitinum frá Heilsutrygd, eru tað framvegis sera fá børn, ið taka av tilboðnum um heilsukanning við skúlabýrjan og enn færri, sum taka av tilboðnum um heilsukanning stutt fyri, at undirvísingarskyldan endar, sí talvu 1.

Talva 1: Tal av børnum og ungum, sum hava tikið av tilboðnum um heilsukanning

| Heilsukanning/Ár | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|
| Við byrjan av skúlatíð barnsins | 139 | 379 | 177 |
| Stutt fyri at ásetta undirvísingarskyldan endar | 15 | 82 | 18 |
| **Íalt** | **154** | **461** | **195** |

Kelda: Heilsutrygd.

Staðfestast kann tí, at hóast hesi tiltøk vórðu sett í verk, hava tey ikki virkað eftir ætlan. Hetta er serliga galdandi fyri eldru næmingarnar, har sera fáir taka av tilboðum um heilsukanning hjá kommunulækna. Tíðin er tí komin til at seta onnur og munadyggari tiltøk í verk, til tess at fáa børn og ung at taka av tilboðum um fyribyrgjandi heilsukanningar.

Landsgrannskoðanin hevur í skrivum til skiftandi landsstýrisfólk í heilsumálum funnist at, at sera fá børn og ung taka av tilboðnum um heilsukanningar við ávikavist byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar. Landsgranngrannskoðanin hevur spurt, hvørt ætlanin er at broyta hetta, til tess at fáa fleiri børn og ung at taka av tilboðunum um heilsukanningar.

Av tí, at so fá børn og ung taka av nevndu kanningum spurdi Løgtingsins fíggjarnevnd í 2017 landsstýriskvinnuna, um hon hevði umhugsað at venda aftur til skipanina við skúlalækna, heldur enn kommunulækna. Landsstýriskvinnan svaraði fíggjarnevndini, at:

"Í eini roynd at fáa fleiri børn og ung at taka av tilboðnum um heilsukanningar, er ætlanin at fara at broyta lógina um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, so heilsufrøðingar fáa møguleika fyri at gera nevndu heilsukanningar. Kommunulæknar varðveita rættin at gera heilsukanningar. Fyrimunurin við at lata heilsufrøðingar kanna børnini og tey ungu er, at heilsufrøðingar longu eru á skúlunum og koma tí í samband við øll børn og ung í Føroyum. Upplýst er, at heilsufrøðingar longu gera ávísar kanningar hjá nærum øllum børnum og ungum í ávikavist 1. og 9. flokki. Verða heilsufrøðingar varugir við, at okkurt er áfatt hjá einum barni ella ungdómi, skulu teir vísa teimum víðari til rætta viðkomandi.

Tey, sum nú verða útbúgvin til heilsufrøðing í Danmark, eru útbúgvin at gera hesar kanningar, eins og tað er sett í donsku lógina, at lækni ella heilsuføðinar kunnu gera kanningarnar. Við støði í hesum verður mett, at tað er ein munandi betri skipan, at heilsufrøðingar kanna børnini og tey ungu, heldur enn at seta ein skúlalækna í starv at gera nevndu kanningar."

## 1.2. Galdandi lóggáva

Tær fyribyrgjandi heilsutænasturnar til børn og ung, sum lógaruppskotið fevnir um, verða reguleraðar sambært niðanfyri nevndu lóg:

- Løgtingslóg nr. 63 frá 17 mai 2005 um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, sum broytt við løgtingslóg nr. 9 frá 12. mars 2014.

Harafturat eru reglur um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung í:

- Kunngerð nr. 88 frá 24. september 2007 um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung.

Endamálið við lógini um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung er, at hon skal gera sítt til at tryggja teimum best møguligar fyritreytir fyri einum heilsugóðum uppvøkstri og vaksnamannalívi.

Sambært lógini fáa øll børn og ung tilboð um níggju fyribyrgjandi heilsukanningar hjá kommunulækna. Børn undir undirvísingarskyldugan aldur fáa tilboð um sjey heilsukanningar.

Tvær av heilsukanningunum skulu bjóðast børnum og ungum í undirvísingarskyldugum aldri. T.v.s. ávikavist við byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at undirvísingarskyldan endar.

Umframt heilsukanningar hjá kommunulækna, fevnir lógin um heilsuveitingar frá heilsufrøðingi, sum børn og ung skulu hava í boði. Ólíkt teimum fyribyrgjandi heilsukanningunum hjá kommunulækna eru ongar ásetingar um, hvussu ofta børn skulu hava tilboð um fyribyrgjandi heilsukanningar hjá heilsufrøðingi og hvussu ofta foreldrini skulu fáa vegleiðing frá heilsufrøðingi. Tørvurin hjá tí einstøku familjuni skal í øllum førum vera ein partur av hesi meting. Ásett er eisini, at tey, sum hava tørv á øktum stuðli og vegleiðing til børn teirra, kunnu venda sær til heilsufrøðing.

Sambært lógini skulu heilsufrøðingar gera heilsukanningar av børnum og veita vegleiðing um heilsu á skúlunum. Harafturat skulu heilsufrøðingarnir eygleiða heilsuviðurskiftini, bæði hjá einstaka barninum og viðvíkjandi almennu umstøðunum fyri heilsuviðurskiftunum. Her verður eisini hugsað um likamligar, sálarligar og sosialar trupulleikar. Vegleiðingin hjá heilsufrøðinginum í mun til skúlabørnini fevnir eisini um vegleiðing til foreldrini og starvsfólk á skúlunum. Harumframt kunnu heilsufrøðingar veita vegleiðing til t.d. dagstovnar og dagrøktarar.

Ásetingar eru um førleikar hjá ávikavist kommunulæknum og heilsufrøðingum. Í lógini eru ongar ásetingar um fráboðanarskyldu, tagnarskyldu, eftirlit ella ásetingar um at lata upplýsingar víðari. Hesi viðurskifti eru ásett í aðrari løggávu.

**1.3. Endamál við lógaruppskotinum**

Endamálið við lógaruppskotinum um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung er at fáa fleiri børn og ung at taka av tilboðnum um fyribyrgjandi heilsukanningar í sambandi við byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við lógaruppskotinum**

Sambært "Lov nr. 316 af 17. maj 1995 om sundhedsvæsenet på Færøerne" (rammulógin) er ásett, at landsstýrið kann áseta reglur um uppgávur, veitingar og fyrisiting hjá heilsuverkinum. Lógaruppskotið um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung er ásett við heimild í § 1, stk. 2, nr. 2-3 og 5 í rammulógini.

Í hesum uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung verður mælt til at fremja eina broyting, samanborið við galdandi lóg. Broytingin snýr seg um at víðka heimildina fyri, hvør kann heilsukanna skúlanæmingar. Ítøkiliga merkir hetta, at heilsufrøðingar við broytingini fara at fáa heimild til at heilsukanna børn og ung við ávikavist byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar. Hesa heimild hava heilsufrøðingar ikki sambært galdandi lóg. Heimildin, sum kommunulæknar longu hava sambært lógini til at gera hesar kanningar, verður ikki ávirkað av lógarbroytingini. Við øðrum orðum varðveita teir heimild sína at heilsukanna børn og ung.

Av tí, at heilsufrøðingar longu starvast á skúlunum, verður roknað við, at munandi fleiri børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri fara at taka av tilboðnum um heilsukanningar, um heimildin í løgtingslógini um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, verður víðkað til eisini at fevna um heilsufrøðingar. Hetta er sama lógarbroyting, sum varð gjørd í Danmark fyri nøkrum árum síðani. Tá var danska sundhedsloven broytt soleiðis, at heimildin at heilsukanna børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri varð víðkað til eisini at fevna um heilsufrøðingar. Læknar varðveita heimild sína at heilsukanna hesi børn og ungu.

Ein fyritreyt fyri, at heilsufrøðingar kunnu gera tær fyribyrgjandi heilsukanningarnar við ávikavist byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar er, at teir hava

viðkomandi útbúgving/eftirútbúgving til at kunna gera slíkar kanningar. Síðani 1. januar 2012 hevur hesin førleiki verið partur av útbúgvingini til heilsufrøðing. Hetta merkir, at tey, sum eru farin undir útbúgving til heilsufrøðing eftir hesa dato, hava neyðuga førleika til at heilsukanna børnini og tey ungu. Teir heilsufrøðingar, sum hava lokið sína útbúgving undan hesi dato, hava ikki henda førleika.

Gigni hevur upplýst, at higartil hava fýra heilsufrøðingar í Føroyum neyðuga førleika at heilsukanna skúlabørn við skúlabyrjan og skúlalok. Tørvur er tí á, at heilsufrøðingar, sum ikki hava neyðuga fakliga førleikan til at heilsukanna børn og ung, fáa hann.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið varð sent til hoyringar hjá Heilsutrygd, Landslæknanum, Kommunulæknafelag Føroya og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Viðmerkingar til lógaruppskotið eru komnar frá: ...............

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Sambært § 11 í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung, ber landið allar útreiðslur sambært lógini. Lógaruppskotið hevur sostatt ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

Talið á børnum í Føroyum sveiggjar nakað ár undan ári. Hetta kemst av at tað er ymiskt hvussu nógv verða fødd árliga, og tí nøkur børn antin flyta til ella úr landinum. Í tíðarskeiðinum 2006-2016 (bæði árini íroknað) eru fødd millum 581-674 børn árliga í Føroyum. Í miðal eru fødd umleið 637 børn árliga hesi árini. T.v.s., at flestu árini eru tað umleið 1.300 skúlanæmingar, sum árliga hava rætt til tilboð um heilsukanningar við byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar.

Av tí, at heilsufrøðingar starvast á skúlunum og frammanundan veita skúlanæmingum ymisk heilsutilboð, verður roknað við, at flestu næmingar í fyrsta og níggjunda flokki fara at taka av tilboðnum um heilsukanningar við ávikavist skúlabyrjan og stutt áðrenn undirvísingarskyldan endar. Hetta fer at hava við sær nakað av eyka arbeiðsbyrðu hjá heilsufrøðingunum og harvið nakað av øktum útreiðslum hjá Heilsutrygd. Tað er tó trupult at meta neyvt um, hvørjar hesar øktu útreiðslurnar fara at verða.

Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Sambært lógaruppskotinum fara heilsufrøðingarnir at fáa eina nýggja uppgávu við tað, at heilsufrøðingar fáa heimild til at heilsukanna børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri við skúlabyrjan og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar. Roknað verður við, at eitt økt tal av skúlanæmingum fara at taka av nevndu tilboðum, og fer hetta at hava við sær nakað av øktum umsitingarligum avleiðingum hjá Heilsutrygd. Ikki ber til at siga ítøkiliga, hvørjar tær umsitingarligu avleiðingarnar fara at verða, sum fara at standast av hesum, tí tað veldst um, hvussu nógvir næmingar fara at taka av tilboðnum.

Lógaruppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið fer eftir ætlan at hava við sær, at børn og ung, sum eru fevnd av lógini, fara at taka av tilboðunum um fyribyrgjandi heilsukanningar við ávikavist byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Hetta økið er ikki fevnt av altjóða avtalum og reglum. Lógaruppskotið hevur tí ikki við sær avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Hetta økið er ikki fevnt av altjóða avtalum og reglum. Lógaruppskotið hevur tí ikki við sær avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**2.9. Marknaforðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær marknaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Ongar slíkar ásetingar eru í lógaruppskotinum.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Ongar slíkar ásetingar eru í lógaruppskotinum.

**2.12. Gjøld**
Ongar ásetingar um gjøld eru í lógaruppskotinum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur**
Ongar slíkar ásetingar eru í lógaruppskotinum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn**
Ongar slíkar ásetingar eru í lógaruppskotinum.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar enn tær, sum eru lýstar.

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1, nr. 1**
Í § 2 í galdandi lóg um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung er ásett, at børn og ung hava rætt til níggju fyribyrgjandi heilsukanningar hjá kommunulækna. Av hesum skulu sjey fara fram, meðan børnini eru undir skúlaaldur; tvær fara fram, meðan tey eru í skúlaaldri. Henda greinin verður broytt, so hon bert fevnir um børn undir skúlaaldur. Ásetingin, sum fevnir um fyribyrgjandi heilsukanningar til børn og ung í skúlaaldri, verður eftir hetta broytt og ásett í eini grein fyri seg, sí Til § 1, nr. 3.

**Til § 1, nr. 2.**
Sum ein avleiðing av broytingunum í § 2, stk. 1 og § 2 a verða § 2, stk. 2-3 strikað.

**Til § 1, nr. 3**
Ein nýggjur kapittul verður settur millum kapittul 2 og 3. Nýggi kapittulin snýr seg um tær fyribyrgjandi heilsukanningarnar, sum annaðhvørt heilsufrøðingar ella kommunulæknar kunnu gera.

§ 2, stk. 3 í galdandi lóg verður broytt, so hon verður til eina grein fyri seg, t.v.s. § 2 a. Sambært nýggju greinini verður galdandi áseting víðkað til eisini at fevna um heilsufrøðingar. Hetta hevur við sær, at umframt kommunulæknar, fara heilsufrøðingar at hava heimild til at gera fyribyrgjandi heilsukanningar við byrjan av skúlatíð barnsins og stutt fyri, at ásetta undirvísingarskyldan endar. Fortreytin fyri, at heilsufrøðingar kunnu gera nevndu heilsukanningar, er, at teir hava viðkomandi fakligar førleikar til tess. T.v.s. hava eina eftirútbúgving samsvarandi “Vejledning om

efteruddannelse af sundhedsplejersker, der skal varetage ind- og udskolningsundersøgelser" (Vejledning nr. 9818 af 24. oktober 2008) frá danska Sundhedsstyrelsen.

**Til § 2**
Gildiskomuregla.

Heilsu- og innlendismálaráðið, XX. februar 2018

**Sirið Stenberg**
landsstýrismaður

/ Turid Arge

**Hjáløgd fylgiskjøl:**